# Norsk Hydro leggur til brots av nýggjum

*-fer úr samstarvinum við Amerada Hess, Dong og Atlants Kolvetni og verður operatørur í Sagabólki*



*Norsk Hydro er ikki longur at finna í Hanusar-gøtu saman við The Faroes Partnership. Nú finna vit tað á Bryggjubakka, har tað skal vera operatørur gjøgnum dótturfelag sítt Saga Føroyar. Á myndini fv. Brynjulv Kløve, stjóri fyri nýggj øki, Arvid Halvorsen, stjóri fyri altjóða leiting, Pauli Einarsson og Geir Atli Rishovd, sum standa á odda fyri Saga Føroyar*

**Mynd jan**

JAN MÜLLER

Ein av komandi døgunum verður avtala undirskrivað millum Norsk Hydro og The Faroes Partnership-bólkin, sum ger, at felagið kann standa frítt at samarbeiða við onnur oljufeløg við Føroyar. Tað verður Saga Petroleum Føroyar, sum fer at standa sum operatørur í bólki saman við Anadarco. Yvirtøkan av Saga er nú heilt liðug, og verður tað Norsk Hydro, sum kemur at eiga Saga Føroyar og reka sítt virksemi á føroyskum øki gjøgnum hetta dótturfelagið.

Eina løtu sá út til, at Norsk Hydro als ikki fór at vera við í leitingini við Føroyar. Tí eftir at felagið uppkeypti Saga, sum var partur av einum øðrum bólki, so mátti Norsk Hydro velja, hvønn av bólkunum tað skuldi vera við í. Og hetta var eingin løtt uppgáva. Eftir drúgvar samráðingar við sín bólk eydnaðist tað so at fáa eina avtalu, sum verður undirskrivað í næstum. Og sambært hesi sleppur Hydro úr bólkinum og kann halda fram gjøgnum Saga Petroleum í hinum bólkinum, tó at ein treyt er, at felagið kann ikki brúka vitanina frá upprunabólkinum í tí nýggja. Tað hevur annars ikki gingið júst so sum Norsk Hydro hevði vónað við nýggja bólkinum. Stóra franska felagið TotalFina og Elf, sum var partur av bólkinum kundi ikki góðtaka uppleggi frá Saga og Anadarco um, hvørji øki man skuldi søkja eftir og hvussu arbeiðsprogrammið skuldi síggja út. So felagið gjørdi korta prosess og tók seg úr bólkinum. Avtalurnar við bólkin eru av slíkum slag, at franska felagið als kann ikki vera við í útbjóðingini. Hetta viðgongur Arvid Halvorsen, stjóri í Hydro er sera óheppið, men gjørt er gjørt. Her vendist ikki aftur. -Vit høvdu ikki ynskt at tað endaði soleiðis, men hetta var so ein einvís avgerð frá franska felagnum, og tað halda vit er stórt spell.

Ein orsøk til at Hydro fór úr hinum bólkinum var, at felagið á tann hátt fekk leiklutin sum operatørur, og tað hevur nógv at siga fyri felagið sigur Arvid Halvorsen, nú teir hava eina rættiliga góða vitan um føroysku undirgrundina. Men hann viðgongur, at hetta var einki lætt val. Tí Amerada bólkurin er ein góður bólkur.

Arvid Halvorsen sigur, at dyrnar standa opnar fyri øðrum feløgum at koma uppí bólkin at avloysa TotalFina og Elf, men undir øllum umstøðum fara tey bæði feløgini at søkja.

Herfyri upplýsti Arvid Halvorsen, at Norsk Hydro hevur stevnt felagnum Sagex og fyrrverandi Sagafólkum inn fyri rættin í Oslo fyri at forða teimum at verða við í eini útbjóðing í Føroyum, har hesir verða í kapping við Norsk Hydro.

-Orsøkin er tann, at hesi fólk á ólógligan hátt brúka virkis- og handilsloynidómar, sum ein fyrrverandi arbeiðsgevari eigur. Her er bæði talan um viðurskifti hesi fólkini hava skrivað undir uppá, tá tey vórðu sett hjá Saga, og ítøkiliga greinar í norskari lóg. Vit vilja hava ein dóm, sum áleggur Sagexfólkunum at gevast við tí arbeiði tey eru í ferð við í sambandi við fyrstu útbjóðing á føroyska landgrunninum.

Málið kemur fyri við rættin í Oslo hósdagin og fríggjadagin. Um hetta fer at fáa avleiðingar fyri samstarvið millum Sagex og Føroya Kolvetni dugir Arvid Halvorsen ikki at siga. Hann vísir bert á, at hetta hevur einki at gera við Føroya Kolvetni, men snýr seg um tey trý fyrrv. Sagafólkini. Tað hevur ikki eydnast okkum at fáa eina viðmerking frá Norsk Hydro til útrættu hondina hjá Terje Hagevang.

Hóast feløg rýma úr føroyska økinum so heldur Arvid Halvorsen, at út frá tí lutvíst lítla økinum talan erum, so eru tað framvegis nógv oljufeløg, sum eru áhugað. -Eg haldi ikki føroyskir myndugleikar hava orsøk til at bera ótta fyri, at henda útbjóðingin ikki skal blíva góð og áhugaverd.

# Grønlendingar vilja læra av føroyingum

*-vilja vita, hvussu føroyska vinnulívið brynjar seg út til komandi oljuútviklingin og annars hvussu vit skipa fyri oljuútbjóðing.*



JAN MÜLLER

Í sambandi við stóra Tórekktiltakið, sum varð hil.dið í Havn seinasta vikuskiftið vitjaði eisini stjórin í grønlendska oljuelagnum, Hans Duus Jørgensen.

Hann helt tað kundi vera áhugavert at kunna seg viðurskifti í Føroyum, sum hava tilknýti til komandi oljuleiting, og her kanska serstakliga spurningin, hvussu føroyska vinnulívið brynjar seg út til nýggju avbjóðingarnar.

Hans Duus Jørgensen vísir á týdning, at eitt nú bæði grønlendingar og føroyingar megna at skipa útviklingin, so mest arbeiði og inntøkur liggja eftir í ávikavíst Grønlandi og Føroyum. -Hetta er ikki nakað, sum skal ganga fyri seg í Stavanger ella í Keypmannahavn. Vit vilja hava, at grønlendingar útbúgva seg til jarðfrøðingar og onnur størv innan oljuvinnuna, og at útviklingurin og menningin í hesi vinnu fer fram í Grønlandi. Vit mugu sjálvir sáa fyri at kunna heysta seinni sigur hann og vísir til tað sannroynd, at grønlendingar hava sítt almenna oljufelag og sipar eisini her til júst sama útviklingin, sum var í Noregi í 70-unum, tá spírin varð lagdur til Statoil.

Hans Duus Jørgensen heldur tó ikki, at tað ber til at samanbera við støðuna í Føroyum, har almenna oljufelagið ikki bleiv til nakað í fyrstu atløgu. -At tit hava tvey privat oljufeløg ger støðuna nógv øðrvísi enn hjá okkum í Grønlandi, men sjálvur haldi eg, at føroyingar eiga at fylgja gongdini sera neyvt og kanna um ikki rætt er at fáa eitt alment oljufelag inn í myndina einaferð seinni, um tað t.d. vísir seg, at her er nógv olja.

-Gjøgnum skattaskipanir fáa tit bert pengarnar. Eitt alment oljufelag kann eisini tryggja virksemi, men kann hetta verða gjørt av privatum, so er tað eisini ein møguleiki. Hinvegin kann man koma at iðra seg um ikki at hava eitt alment oljufelag, um man fær ein útvikling, sum líkist tí í Noregi.

Grønlendingar eru sera spentir um útviklingin á oljuøkinum. Tað er sannlíkt, at har verður funnið gass, heldur enn olja.

-Tað er ein trupulleiki at halda bjartskygnið millum grønlendingar aftur sigur Hans Duus Jørgensen, sum tó eisini vísir til hagtølini,s um siga, at olja verður bert funnin í eini út av hvørjum 10 boringum. Og tað er so eisini nakað, sum man má hava í huganum, tá man skal meta um eina framtíðar oljuvinnu.

Nýggja Statoil boriskipið Navion skal byrja at bora í Grønlandi í juli. Hetta er eitt spildurnýtt boriskip, sum í løtuni roynir seg í norskum øki.

Hans Duus Jørgensen er komin til Føroya fyri at vita, hvussu vit bera okkum at, nú tað stundar til eina oljuvinnu.

Hóast grønlendingar fara at bora longu í summar, so eru teir kortini aftanfyri okkum vísir hann á. Tí fyrsta útbjóðingin við Grønland verður ikki fyrr enn næsta ár. -Hetta kann skiljast eitt sindur øvugt fyri tykkum, men støðan er tann, at henda fyrsta boringin verður gjørd, áðrenn oljufeløgini frítt sleppa at bjóða. Hans Duus Jørgensen er væl greiður yvir, at hetta er nakað av einum hasardspæli, tí gevur henda fyrsta boringin eitt negativt úrslit, so kann tað fáa negativa ávirkan fyri alla komandi útbjóðingina, soleiðis at tað verður avmarkað, hvussu nógv feløg tá í heila tikið vilja brúka pengar í hesum fjarskotna økinum.

Men her vendist ikki aftur. Nú verður so borað, og eftir tað fer so at koma ein útbjóðing. Tað eru Statoil, Dong, Phillips og Nunaoil, sum hava fingið loyvi til hesa fyrstu boringina til havs í Grønlandi. So fáa vit at síggja hvussu gongur.

Grønlendingar hava eina heilt aðra skipan á undirgrundarøkinum enn føroyingar. Teir hava viljað havt eina skipan, har Danmark og Grønland eiga helvt um helvt av møguligum inntøkum í undirgrundini og standa tí eisini fyri hvør síni helvt at menningini av økinum.

Hans Duus Jørgensen hevur arbeitt í oljuvinnuni í meira enn 15 ár. Hann er útbúgvin cand.polit. og hevur arbeitt hjá danska orkumálaráðnum, síðani hjá Dong og nú hjá Nunaoil.

Dong eigur helvtina av Nunaoil, og Heimastýrið eigur hina helvtina.

Eins og í Føroyum halda grønlendingar, bæði politikarar og fólkið annars, at tað hevði verið gott um búskapurin fekk fleiri bein at standa á, og her kann olja koma at hava týdning.

Stjórin í Nunaoil vónar, at tað ber til at samvinna á oljuøkinum, nú Grønland og Føroyar gera seg út til oljuleiting.



# Bjóða føroyingum viðgerð

*Umboð fyri danska Sclerosefelagið hava verið í Føroyum og kunnað føroyingar um teir møguleikar, sum eru á donskum sclerosesjúkrahúsum*

EDVARD JOENSEN

Fyri 250.000 krónur kunnu fimm føroyingar árliga fáa viðgerð fyri sclerose á donskum sjúkrahúsum. Tvey sclerosesjúkrahús eru í Danmark.

Hetta er eitt tilboð, sum umboð fyri danska Sclerosefelagið hava givið føroyskum myndugleikum. Nú er so upp til føroysku politikararnar, um tikið verður av.

Jørgen Clausen, professari, sum er nevndarformaður í danska Sclerosefelagnum, segði á tíðindafundi í Havn mánadagin, at umboðini fyri danska felagið, sum hava verið í Føroyum seinastu dagarnar, hava havt fund við embætisfólk í føroyska heilsuverkinum. Hesi vóru sera positiv, segði Jørgen Clausen, men søgdu seg verða noydd at bíða eftir eini avgerð, til landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum var komin aftur úr Danmark av samráðingarferð um fullveldi.

Eisini høvdu donsku umboðini verið á Landssjúkrahúsinum og hugt at teimum møguleikum, sum har eru fyri fólk við sclerose. Tey róstu starvsfólkinum fyri ta viðgerð, tey geva og søgdu, at hon var fult á hædd við tað, danir geva. Men fysisku umstøðurnar eru ikki í námind av tí, sersjúkrahúsini í Danmark kunnu bjóða sclerosesjúklingum.

Tað kemst fyrst og fremst av, at hesi sjúkrahúsini eru burturav til sclerosesjúklingar við ørgrynni av møguleikum.

### Víkingasjúka

Sclerose er sjúka, sum sett verður í samband við víkingarnar. Jørgen Clausen, formaður í danska Sclerosefelagnum, sigur, at sjúkan er at finna á teimum støðum, har eftirkomarar víkingana búgva. Í Skandinavia, Skotlandi og har á leið, og í teimum stóru landbúnaðarstatunum í USA, har norðulendskir innflytarar settust niður.

Tó er sjúkan rættiliga nýggj í Føroyum. Her var einki dømi um sjúkuna undan Seinna Heimsbardaga. Men stutt eftir krígslok vóru ikki færri enn 48 fólk skrásett við sjúkuni.

Kanningar hava víst á, at samband er millum hesi dømi og tey støð, har skotskir hermenn vóru undir krígnum. Hildið verður tí sannlíkt, at sjúkan er komin hendan vegin við hesum hermonnunum. Í dag eru 50 tilburðir av sclerose skrásettir í Føroyum.

Og hesir 50 tilburðirnir svara væl til tað, hagtølini aðrastaðni eisini vísa. Títtleikin er ein av túsund íbúgvum, siga hagtølini.

Ofta verður sjúkan staðfest hjá fólki í 20 til 40 ára adri, men kann tó vísa í øllum aldri. Sjúkan ávirkar nervaløgini og lammar so teir partar av kroppinum, sum eru stýrdir av teimum nervum, sum sjúkan rakar. Soleiðis er eingin eintýðug lýsing sum so. Hvør einstakur sjúklingur hevur í grundini sítt heilt privata dømi av sclerose.

Tey eyðkennini, sum tó oftast eru at síggja, eru niðursettur førleiki, javnvágstrupulleikar, følilsið versnar, sjónin viknar, trupulleikar við vatninum, seksuelli hugurin minkar, og mental frávik.

### Hjálp finst

Tað ber til at hjálpa sclerosesjúklingum, hóast teir ikki verða grøddir. Og nógv verður eisini gjørt fyri at sjúklingarnir skulu fáa tað so gott sum gjørligt.

Sjúkan rakar, sum sagt, ymiskt frá persóni til persón, og tí ber ikki til at leggja eina generella viðgerðarskrá. Tað má gerast eftir tørvinum hjá tí einstaka.

Og her hava tey bæði donsku sclerosesjúkrahúsini framúr góðar møguleikar, sum føroyskir sjúklingar eisini eiga at fáa nyttu av, sigur Jørgen Clausen, formaður í Danska Sclerosefelagnum.

Hóast bíðilisti er at sleppa inn á hesi sjúkrahúsini, hava tey kortini valt at bjóða føroyingum fimm pláss árliga. Føroyinar hava fyrr fingið viðgerð á hesum sjúkrahúsum, men tann møguleikin fór við kreppuni, sum var.

Hinvegin er dømi, har maður hevur sett hús og heim í veð fyri lán, so hann slapp á danskt sjúkrahús til viðgerð. Og tað halda tey í danska felagnum ikki, at føroyingar eiga at bjóða hesum fólkunum. Tí komu tey hendanvegin við hesum tilboðnum, har tey bjóða fimm føroyingum árliga í viðgerð fyri eina kvart millión.

Ikki tí at teimum tørva sjúklingar at fylla sengurnar. Bíðilisti er sum sagt.



*Føroyskir sclerosesjúklingar eiga at fáa somu møguleikar fyri viðgerð á donskum sersjúkrahúsum, sum aðrir sjúklingar fáa, sigur Jørgen Clausen, formaður í danska Sclerosefelagnum, sum hevur verið í Føroyum og greitt frá teimum møguleikum, sum eru*

**Mynd: Jens Kristian Vang**

Men tí tey meta, at sami rættur til viðgerð skal vera galdandi fyri allar sjúklingar.

# Væl hýrdur veðurmaður



*Veðrið verður gott restina av vikuni, sigur Petur Skeel, veðurmaður á Sosialinum. Serliga um vikuskiftið. Upp móti einum 15 hitastigum væntar hann, tað fer at verða leygardagin*

Hann er í góðum hýri, Petur Skeel, veðurmaður. Nú mai máni er komin, kemur lýkkan eisini, sigur hann og væntar, at veturin er av á hesum sinni.

Vit fara at fá lýggjari veður, um ikki so stabilt hvønn dag. Eitt sindur av regni verður eisini, men kuldin skuldi verið burtur nú, heldur Petur Skeel Jacobsen, veðurmaður hjá Sosialinum, sum eins og vit onnur heilsar sólini hjartaliga vælkomnari.

Og veðrið verður gott restina av vikuni, sigur Petur Skeel. Serliga um vikuskiftið. Upp móti einum 15 hitastigum væntar hann, tað fer at verða leygardagin. Lágætt ella kanska eitt lítið lot av ymsum ættum. Eitt hátrýst er um okkara leiðir og verður væntandi beint yvir okkum leygardagin, sum fer at verða tann besti dagurin, sigur Petur.

Apríl mánaður hevur verið kaldur og turrur. Í ár var meðalhitin í apríl 3,3 hitastig, meðan tað vanliga er 4,9 stig. Og turt hevur eisini verið. Vanliga regnar tað 96 mm í apríl, meðan tað í ár bara komu 59,5 mm niður.


RICHARD RAGNVALD
á Hotel Föroyum

Leygarkvøldið 13/5

Til Matna

❊ Laksapaté
við salati og heimabakaðum breyði

❊ Heilstoktur lambsryggur
við grønmeti, Bordlaise sós og Pom a la Creme

❊ Sjokolátuyvirtrekt ístrifla
við berjamorli og róma

RICHARD RAGNVALD undirheldur undir borðhaldinum og INJOYERS spæla til dans

Sosialurin - 311820



Kostnaður fyri tiltakið kr. 295,-
Bílegging á
tel. 31 75 00

Forsølan av atgongumerkjum er byrjað

Eisini fæst bílig gisting

Altíð vælkomin á
Hotel Föroyar
Best Western
Tel. 317500